# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 10. januar 2014

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Magni Bertholdsen, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen. Eyðfinn Debes og Rúni Thomsen kundu ikki møta.
Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – hetta kemur inn sum mál nr. 6.

Fundurin varð settur kl. 17.00.

1. **Umsókn um stuðul frá Føroya Fuglafrøðifelag.**
   Søkt verður um stuðul á kr. 500,-. Samtykt varð einmælt at stuðla teimum við hesari upphædd.

2. **Tilboð frá Sp/f Kirvi uppá vatnkølara v.m. til Eldrasambýlið.**
   Samtykt varð einmælt ikki at taka av tilboðnum uppá vatnkølara.

3. **Skriv frá Hvalbiar skúla viðv. læknastovuni og stovu 3.**
   Undirvísing fer ikki fram í læknastovuni av heilsuligum ávum og modnaroykur kennist í stovu 3 í erva. Hans Haraldsen frá HMP Consult hevur verið í Hvalbiar skúla og tikið sopparoynd í læknastovuni. Royndin vísir ongi tekin uppá sopp í skúlastovuni. Samtykt varð at biðja Tangavirkið um tilboð uppá eina eyka útluftningsskipan til stovuna. Í skúlastovu 3 er leki funnin og umvældur.

4. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
   **Vega- og havnanevnd:**
   - Skriv frá borgara viðv. leingjan av vegnum Gaddareyn.
   - Skriv frá borgara viðv. asfaltering av túni.

5. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**
   - Skriv frá borgara um at fáa grivið fram við ánni: Tekniska nevnd hevur verið á staðnum og mælir til, at onki verður gjørt við málið. Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá nevndini.
   - Minnisvarðin í Sandvík: Umboð fyri Grótvirkið í Skopun (Heini Tausen) hevur verið á staðnum og koma teir við trimum ymiskum tilboðum uppá umvæling av minnisvarðunum í Sandvík og Hvalba.

   **Vega- og havnanevnd (framløga Jóhan Eli Poulsen):**
   - Havnin á Hamranesi: Nevndin kunnaði um, at nakrir stórir steinar, ið vóru til ampa fyri skipini, ið leggja til bryggju, eru tiknir upp av botninum á Hamranesi.

6. **Val av umboði til Suðuroyar Barnaverndartænastu.**
   Skotið varð upp at velja Trúgva Gudmundarson sum fast umboð í Suðuroyar Barna-verndartænastu og Rúna Thomsen sum eykaumboð og varð hetta einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Martin í Nesi

Niels J. Thomsen Jóhan Eli Poulsen